Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 28.10.2021 kl. 17:30
Málnr.: 20/01212 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig
Varalimir: Herfrí J. Sørensen møtti fyri Oddmar á Lakjuni
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
155/21	21/01260-3	Býráðslimur forfall - Oddmar á Lakjuni
156/21	21/01249-1	Borgarakanning
157/21	21/01135-1	Játtan til virksemi - Heilsunevndin
158/21	20/01167-1	Skoytubreytin 2021/2022
159/21	17/01026-89	Stýrisbólkur fyri bygging av kappróðrarneysti
160/21	21/01148-2	Marknaumskipan millum matr.nr. 1154 og 1155 við Stangavegin
161/21	21/01165-1	Framhald av matrikulering av miðbýarøkinum - nú byggiøki 5 og 6
162/21	14/00665-270	Vegur til sethús á matr.nr. 1063
163/21	21/00585-11	Møgulig søla av matr. nr. 53 á Húsum
164/21	21/00621-7	Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2021 – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
165/21	21/00751-4	Rakstrartørvur á Skúlatrød – tørvur á eykajáttan 2021 – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
166/21	21/01161-1	Hækkan og leingjan av kaiini á Eiðinum í Svínoy – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
167/21	20/01227-24	Vetrarhaldið í 2021 - serlig avbjóðing – *eykajáttan, seinna viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
168/21	21/00407-30	Lántøka 2021 – oktober
169/21	17/00521-11	Umsókn um grundøki til vinnuligt virksemi

Til viðgerðar

155/21
21/01260-3 Býráðslimur forfall - Oddmar á Lakjuni

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	155/21

21/01260-3 Býráðslimur forfall - Oddmar á Lakjuni

Frágreiðing um málið:
Oddmar á Lakjuni, býráðslimur valdur fyri Fólkaflokkin, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 28. okt. 2021. Næstvaldi á listanum hevur eisini forfall, og tí er heitt á Herfrí J. Sørensen, ið er triðivaldi tiltakslimur á listanum, um at møta til fundin.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1 og stk. 3

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sætið í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til áheitanina um at innkalla tiltakslim fyri Oddmar á Lakjuni.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Einmælt samtykt at lata Herfrí J. Sørensen taka sæti í býráðnum til fundin.

156/21
21/01249-1 Borgarakanning

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.10.2021	119/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	156/21

21/01249-1 Borgarakanning

Frágreiðing um málið:
Mælt verður til, at ein borgarakanning verður gjørd í 2022.

Høvuðsmálið við kanningini er at fáa vitan til vega, sum vísir, hvat borgarar og onnur halda um tænasturnar, sum kommunan veitir.

Kanningarúrslitini verða viðgjørd í politisku skipanini og í fyrisitingini. Grundað á viðgerðirnar verða átøk framd og neyðugar broytingar gjørdar, ið skulu veita enn betri og málrættaðar tænastur í kommununi.

Tað er týdningarmikið at taka borgaran, vinnu, mentan og ítrótt o.o. áhaldandi við upp á ráð í arbeiðinum, sum Klaksvíkar kommuna ger og við atliti at framtíðarmenning av Klaksvíkar kommunu. Við borgarakanning verður virðismikið íkast fingið til vega frá borgarum og avvarðandi áhugapørtum.

Vitan og íkøst verður fingið til vega við spurnarkanning, samrøðum og borgarafundum.

Býráðið fær høvi til at geva sítt íkast til fokusøki í kanningini.

Ætlanin er, at høvuðsarbeiðið verður gjørt av fyrisitingini. Uttanhýsis serkøn hjálp (spurnarkanning og dátugreining) verður brúkt.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Metti kostnaðurin er 200.000 kr.

Tilmæli:
Mælt verður til at, at farið verður í gongd við at fyrireika borgarakanningina og at fremja kanningina í 2022.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið, dagf. 21-10-2021, einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

157/21
21/01135-1 Játtan til virksemi - Heilsunevndin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	04.10.2021	22/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	04.10.2021	142/21
3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	05.10.2021	36/21
4 Fíggjarnevndin	26.10.2021	127/21
5 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	157/21

21/01135-1 Játtan til virksemi - Heilsunevndin

Frágreiðing um málið:
Í fundarumførunum í januar 2021 varð uppskot um skipan av Heilsunevndini lagt fyri allar avvarðandi nevndir og varð samtykt fyrru ferð av býráðnum. Í februar varð sama tilmæli – við nøkrum nágreiningum og tillagingum – lagt fyri aftur og samtykt seinnu ferð av býráðnum.

Úr ásetingunum fyri HeiN:

> 6. petti. Fíggjarligar heimildir: Heilsunevndin fær formliga heimild frá føstu býráðsnevndunum til at disponera fíggjarliga innan tær til eina og hvørja tíð galdandi játtanir á fíggjarætlan býráðsins,

sum hesar býráðsnevndir ítøkiliga geva heimild til. Heilsunevndin fær eina játtan á fíggjarætlan býráðsins til fígging av virkseminum hjá nevndini.

Sum tað framgongur av ásetingunum í § 43, 6. Petti, so skal HeiN hava eina játtan tillutaða á fíggjarætlan býráðsins til fígging av virkseminum hjá nevndini, og tað er í hesum sambandi, at hetta mál og tilmæli verður lagt fyri politisku skipanina.

Lógargrundarlag:
Í kommunustýrislógini, kap. 7 um "aðrar nevndir og umboðan" er ásett í § 36, stk. 2, at "kommunustýrið ásetir nærri reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum".

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjarligi parturin av virkseminum hjá HeiN er ikki útgreinaður, men í umrøðuni hevur frá politiskari síðu verið nevnt, at HeiN hóskandi kundi fingið eina játtan í fíggjarætlan býráðsins á 500 tkr.

Tilmæli:
Mælt verður avvarðandi nevndum og býráðnum til at taka spurningin um játtan til HeiN við í arbeiðið við fíggjarætlan býráðsins fyri 2022.

Heilsunevndin 4. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 27-09-2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 4. oktober 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB, OáL og TJL, tekur undir við HeiN 04-10-2021.
JS tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 5. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við HeiN, dagfest 04-10-2021.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við meirilutanum í UBN 04-10-2021.
JS tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið, dagf. 27-09-2021, einmælt samtykt.

158/21
20/01167-1 Skoytubreytin 2021/2022

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.10.2021	126/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	158/21

20/01167-1 Skoytubreytin 2021/2022

Frágreiðing um málið:

Skoytubreytin 2021-2022
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 21. okt. 2021, verður greitt gjøllari frá málinum.

Ætlanin var at fáa skoytubreytina lidna til veturin í ár, men skoytubreytin verður nokk ikki endaliga liðug fyrr enn á heysti 2022.

Arbeiðið við at samskipa tilboðið undanfarin ár hevur gingið væl. Størsta arbeiðsbyrðan hevur veriða at svara øllum fyrispurningunum, sum koma umvegis skoytubreyt@klaksvik.fo og boðklivan á facebook síðuni. Somuleiðis at syrgja fyri, at fólk eru til arbeiðis allar tímarnar, skoytubreytin hevur opið. Tað er vikudagar, í vikuskiftinum og aðrar frídagar, t.d. jóladagarnar. Í samband við leigu av skoytubreytini, so er eisini tørvur á, at starvsfólk eru til arbeiðis í dagtímunum, tí tá verður latið upp kl. 9.00.

Samskiparin hevur víst á, at støða má takast í góðari tíð til, um arbeiðið skal bjóðast út, men ynski er frá umsitingini, at samskiparin heldur fram, so leingi skoytubreytin ikki er løgd í fasta legu. Samskiparin er áhugaður í at taka eitt ár afturat.

Mælt verður til, at skoytubreytin verður skipað sum undanfarin ár, tó við tí broyting, at umstøðurnar kring skoytubreytina verða munandi betri.

Mett verður, at ein kostnaður á 94.000 kr u/mvg, sum fer til at útvega hóskandi bingjur til endamálið, kann hækka tænastustøðið og gera heildarupplivingina hjá kundanum betri.

Mælt verður somuleiðis til, at eitt rakstrarstað verður stovnað til 2022, tí at áður er raksturin farin av UBN og Umsiting annað.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
500.000 kr rakstur
40.000 kr í løn
94.000 kr útbygging av skúrum
100.000 kr mettar inntøkur

Tilmæli:
Mælt verður til, at skoytubreytin verður skipað sum undanfarin ár, tó við tí broyting, at umstøðurnar kring skoytubreytina verða munandi betri.

Mælt verður somuleiðis til, at eitt rakstrarstað verður stovnað til 2022.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið, dagf. 21-10-2021, einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

159/21
17/01026-89 Stýrisbólkur fyri bygging av kappróðrarneysti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	05.10.2021	67/21
2 Fíggjarnevndin	26.10.2021	120/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	159/21

17/01026-89 Stýrisbólkur fyri bygging av kappróðrarneysti

Frágreiðing um málið:
Eftir ætlan byrjar arbeiðið fyrsta dagin við at byggja nýtt kappróðrarneyst, sum verður staðsett í miðbýnum.

Byggireglurnar hjá Klaksvíkar kommunu siga, at ein 5 manna nevnd skal veljast at hava ábyrgd fyri projektum omanfyri 10 mió. kr., tá ið hesi projekt verða framd. Einstaka byggistigið, sum verður gjørt í løtuni kemur ikki upp um 10 mió. kr., men samlaða verkætlanin er yvir 10 mió. kr.

Kommunan hevur tó ongantíð brúkt áður nevndu byggireglurnar. Men ístaðin er ein byggiharraráðgevi settur, ið samstarvar við ein stýrisbólk.

Leiðslan í kommununi hevur í hesum sambandi heitt á viðkomandi nevndir og býráð um at gera frávik frá byggireglunum, tí talan er um eina strangari skipan. Høvuðsuppgávan hjá stýrisbólkinum er at tryggja, at kommunan fær arbeiðið til rættan kostnað, til røttu tíð og við umbidnari dygd.

Skipað verður fyri fundi einaferð um mánaðin, fyrsti fundardagur verður væntandi í november.

Sambært praksis hjá kommununi manna hesi stýrisbólkin:
1. Borgarstjóri, Karl H. Johansen (formaður)
2. Kommunustjóri, Rúni Rasmussen
3. Formaður/kvinna fyri nevndina, sum eigur verkætlanina, Jóhanna Christiansen, MeN
4. Stjórin fyri fyrisitingina, sum eigur verkætlanina, Eirikur í Jákupsstovu
5. Tekniski stjórin, í løtuni Rúni Rasmussen
6. Stjórin fyri stovnin, sum byggir (eingin í hesum føri)
7. Byggiharraráðgevi, SMJ (fundarskrivari)

Um mett verður, at aðrir persónar skulu luttaka á fundi ella á einstøkum fundi, so kallar formaðurin fyri stýrisbólkin hesar inn. Nærliggjandi er, at umboð fyri kappróðrarfelagið luttaka á summum fundum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

Tilmæli:
Mælt verður til, at stýrisbólkur verður settur saman eftir oman fyri nevnda leisti.

Mentanarnevndin 5. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 28-09-2021, tó við teirri viðmerking, at tekniska fyrisiting hevur umboð í nevndini, til tekniskur stjóri er settur, og at fyritøkan hjá byggiharraráðgevanum ikki er útvald enn.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið, dagf. 28-09-2021, einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá MeN 05-10-2021 einmælt samtykt.

160/21
21/01148-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1154 og 1155 við Stangavegin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	04.10.2021	K-7/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	04.10.2021	136/21
3 Tekniska Nevnd	06.10.2021	K-25/21
4 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	160/21

21/01148-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1154 og 1155 við Stangavegin

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av matr.nr. 1154 og 1155 søkja um loyvi at marknaumskipa, soleiðis at nýggja markið verður flutt longur norður til at liggja í forleingilsi av verandi betonggarði longur uppi.
Umsóknin leggur upp til, at nýggja markið verður ein bein linja frá vegnum og niðan móti verandi betonggarði



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Umsiting tekur undir við umsóktu marknaumskipan, - men mælir tó til, at verandi hornaavskurður verður varðveittur – hetta fyri at tryggja útsýnið í samband við útkoyring frá matr.nr. 1154.

Ferðslunevndin 4. oktober 2021:
Málið verið til kunningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 4. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 23-09-2021.

Tekniska Nevnd 6. oktober 2021:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá UBN 04-10-2021 einmælt samtykt.

161/21
21/01165-1 Framhald av matrikulering av miðbýarøkinum - nú byggiøki 5 og 6

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	04.10.2021	138/21
2 Havna- og Vinnunevndin	05.10.2021	K-15/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	161/21

21/01165-1 Framhald av matrikulering í miðbýarøkinum – Øki A, byggifelt 5 og 6

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar Býráð hevur á fundi 28. jan. 2021 samtykt treytaða tilsøgn um leigusáttmála til íbúðabygging í miðbýnum (mál 20/01234).

Langtíðarleigusáttmáli krevur sjálvstøðugt matr.nr.



Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 1. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti

Fíggjarligar avleiðingar:
Gjald fyri matrikulering fíggjast av miðbýarøkinum.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyrinevnda verður mælt til, at umsókn um sundurbýti í tráð við byggiøki 5 og 6 í Serstøku Byggisamtytini fyri miðbýin verður sent Umhvørvisstovuni til matrikuleringar/góðkenningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 4. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 23-09-2021.

Havna- og Vinnunevndin 5. oktober 2021:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá UBN 04-10-2021 einmælt samtykt.

162/21
14/00665-270 Vegur til sethús á matr.nr. 1063

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	04.10.2021	144/21
2 Tekniska Nevnd	06.10.2021	64/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	162/21

14/00665-270 Vegur til sethús á matr.nr. 1063

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 22. sept. 2021.

Søkt verður um koyriveg til sethúsini á matr.nr. 1063 omanfyri Skáltavegin í Klaksvík. Hetta merkir, at ynski er um, at vegurin "við Ravnagil" verður longdur norður til matr.nr. 1064b/1063.

Áður er søkt um nýggja atkomu til sethúsini, og nevndirnar hava samtykt at geva eigaranum loyvi til at gera eina gongugøtu sjálvur.

Vegadeildin hevur síðani framt eitt umfatandi drenarbeiði í økinum, og gongugøtan kom sum ein nátúrligur partur av hesum arbeiðinum.

Spurningurin er, hvar vegurin við Ravnagil skal enda. Um umsóknin verður gingin á møti, hvat við teimum, sum búgva longri norðuri við somu avbjóðingum? Um so varð, at allir eigarar av útlagda vegalendinum vóru samdir um at lata neyðuga lendið til kommununa, so er málið meira áhugavert hjá kommununi.

Arbeiðið at gera verandi veg lidnan við gøtuljósum og betongkantum og asfalti er ikki raðfest, og fleiri vegir eru raðfestir fremri m.a. vegurin til samanbygdu sethúsini omanfyri Stangavegin, sum er ein peningakrevjandi verkætlan.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin peningur er tøkur til nýggja vegagerð í 2021.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyri standandi kann tekniska umsiting ikki viðmæla umsóknini um koyriveg norður um sethúsini á matr.nr. 1095b.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 4. oktober 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-09-2021, málið um vegin verður tikið upp í samband við mál *14/00665 Vegir til eldri sethúsaøkir*.
Ein minniluti, JS og TJL, mælir til, at arbeitt verður víðari við at gera veg norðeftir, so atkoma fæst til fleiri sethús, og at málið verður tikið upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2022.

Tekniska Nevnd 6. oktober 2021:
Ein meiriluti, OáL, EÓP, GvK og ÓML, tekur undir við meirilutanum í UBN 04-10-2021.
Ein minniluti, TJL, tekur undir við minnilutanum í UBN 04-10-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælini frá UBN 04-10-2021 og TN 06-10-2021; tey fullu við 3 atkvøðum fyri (JS, TJL og SVJ) og 8 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, EÓP, HJS, JCC, ASB og ÓML).

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini í UBN 04-10-2021 og TN 06-10-2021; tey vórðu samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, EÓP, HJS, JCC, ASB og ÓML), ongari atkvøðu ímóti, og 3 atkvøddu ikki (JS, TJL og SVJ).

163/21
21/00585-11 Møgulig søla av matr. nr. 53 á Húsum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.10.2021	131/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	163/21

21/00585-11 Møgulig søla av matr. nr. 53 á Húsum

Frágreiðing um málið:
Í samband við viðgerðina av málinum í mai og september 2021 hevur FíN nýggja samtykt, har nevndin mælir til, at umsitingin kannar løgfrøðiliga, hvat orðingin "borgarar í kommununi hava framíhjárætt at keypa ognina".

Fyri at eingin misskiljing skal verða so verður alt svarið frá løgfrøðingi kommununnar tikið við her niðanfyri:
Orðið "borgari" svarar væl nøkurlunda til bústað og skattskyldu í kommununi, meðan "framíhjárætt" merkir, at mann hevur betri møguleika enn onnur.

Ein spurningur, sum kann setast, er um framíhjárætt í hesum føri merkir, at um ein borgari í kommununi bjóðar til dømis 1.000 kr., og ein ikki-borgari bjóðar 500.000 kr., skal mann so taka av tí hjá borgararnum? Svarið til hetta er helst ja í hesum føri.

Tá kann ein góður ventilur vera at skriva "kommunan tilskilar sær møguleikan at geva borgarum í kommununi framíhjárætt."

Men tá kann gerast neyðugt at forklára, at ognin verður seld eftir fleiri kriterium, har prísur er eitt.

Ein annar spurningur er, hvat hendir um nú ein borgari keypir ognina fyri 1.000 kr. og viðkomandi so dagin eftir selur somu ogn til ein ikki borgara fyri 500.000 kr.

Tað ber tað mær vitandi illa til at verja seg fyri, men ein hjálp kann vera at fáa ein meklara at meta um ognina og út frá hesari at geva ognini ein minsta søluprís.

At geva borgarum betri rætt enn onnur er ikki nakað ókent í kommununi annars, har tað til dømis var støðan í samband við neystabyggingina í Árnafirði, har ikki-borgarar til eina og hvørja tíð eru aftast á listanum. Tá aðrir borgarar koma á listan, so vórðu ikki-borgararnir fluttir aftur um hesi.

Hetta svarar heilt vist ikki øllum spurningum, sum kunnu stinga seg upp í samband við eina slíka viðgerð, men hetta er so eitt boð uppá onkrar av mest grundleggjandi spurningunum.

Lógargrundarlag:
Kunngerð nr. 122 frá 22. des. 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

Fíggjarligar avleiðingar:
Úr tilmælinum í september 2021: *Verður húsið selt, fær kommunan eina inntøku burtur úr søluni, møguliga einar 750 tkr. Gjørt verður vart við í hesum sambandi, at tørvurin fyri peningi til framhald av*

vega-, kloakk-, gøtuljós- og drekkivatnsarbeiðinum á Húsum er stórur. Tørvurin innan "fastognarøkið" er sum kunnugt eisini stórur.
Umsitingin leggur tí við hesum eisini upp til, at FíN og býráðið viðgera spurningin, um sølupeningurin kann koma Húsa bygd til góðar í 2021 ella í 2022.

Tilmæli:
Við hesum verður svarið frá løgfrøðingi kommununnar latið nevndini.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Ein samd nevnd samtykti at gera eina uttanhýsis virðismeting av ognini, áseta minstaprís og seta húsini til sølu. Peningurin fyri søluna skal koma Húsum til góðar.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

164/21
21/00621-7 Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2021 - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	05.10.2021	55/21
2 Fíggjarnevndin	26.10.2021	123/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	164/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	

21/00621-7 Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2021

Frágreiðing um málið:
Trivnaðarnevndin Børn og Ung og Fíggjarnevndin staðfestu í juni fundarumfarinum fíggjartørvin og mæltu til, at spurningin um eykajáttan verður tikin upp til heystar.
Vísandi til omanfyristandandi, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerð og støðutakan.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003:

> § 41. Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021:

> § 68. Kommunurnar halda útreiðslurnar, ið standast av hesi lóg, tó undantikið útreiðslur, ið standast av § 69, stk. 1.
> Stk. 2. Tær kommunur, ið samstarva um at seta felags barnaverndarnevnd sambært § 4 og felags barnaverndarumsiting sambært § 5, verða eisini at býta tær útreiðslur, ið standast av hesi lóg, sínámillum. Hesar kommunurnar býta útreiðslurnar, svarandi til fólkatalið í kommunala samstarvinum.
>
> § 69. 3) Landið heldur útreiðslurnar fyri stovnsetan og rakstur av Høvuðsbarnaverndarnevndini og fyri stovnsetan og rakstur av samdøgursstovnum, herundir familjuviðgerð á samdøgursstovnum,

fyri stovnsetan og rakstur av dagstovnum hjá landinum, sambært § 33, stk. 2, fyri stovnspláss uttanlands, sambært § 35, stk. 2 og harumframt fyri útreiðslur í sambandi við ókeypis umboðan, sambært § 57.
Stk. 2. 3) Barnaverndarøkini rinda brúkaragjald fyri at seta barn á stovn sambært hesi lóg. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um brúkaragjaldið.

Fíggjarligar avleiðingar:

Barnaverndin	Ætlan 2021	Nýtsla pr. 31-08-2021	Nýtsla pct pr. 31-08-2021	Nýtsla umroknað 12 mðr	Mett meirnýtsla	Nýtsla pct pr. 31-12-2021
Barnaverndarstovuna Føroya	279.000	198.524	71,2	297.786	-18.786	106,7
Barnaverndin	4.081.000	3.637.818	89,1	5.456.727	-1.375.727	133,7
Børn í fosturforeldraskipan	1.769.000	1.420.483	80,3	2.130.725	-361.725	120,4
Stovnspláss og brúkaragjøld serstovur	1.221.000	860.916	70,5	1.291.374	-70.374	105,8
	7.350.000	6.117.741	83,2	9.176.612	-1.826.612	124,9

Smb. omanfyristandandi sær út til at fara at vanta kr. 1.826.612 kr. í fíggjarætlanini hjá BVT í Norðoyggjum.

Barnaverndartænastan í Norðoyggjum er eitt samstarv millum allar kommunur í Norðoyggjum, og kostnaðurin er deildur eftir íbúgvaratalinum í teimum ymsu kommununum. Klaksvíkar kommuna er størsta kommuna í samstarvinum, og okkara partur er 84,6% ella 1.545.314 kr.

Av tí at umsitingin ikki sær møguleikar at finna fígging við flyting millum rakstrarstøð, er neyðugt við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku.

Tilmæli:
Biðið verður um eykajáttan á samlað netto 1.550.000 kr. í inniverandi ári (2021) til rakstrarstøðini: 02213170020 Barnaverndarstova Føroya, 02213170060 Barnaverndin, 02213170070 Børn í fosturforeldraskipan og 02213170078 Stovnspláss og brúkaragjøld serstovur.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 5. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 24-09-2021. Eykajáttanin skal fíggjast av *tøkum peningi*.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið frá B&U 05-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

165/21
21/00751-4 Rakstrartørvur á Skúlatrød – tørvur á eykajáttan 2021 – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	05.10.2021	56/21
2 Fíggjarnevndin	26.10.2021	124/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	165/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	

21/00751-4 Rakstrartørvur á Skúlatrød – tørvur á eykajáttan 2021

Frágreiðing um málið:
Á regluliga fundinum hjá Trivnaðarnevndini Børn og Ung í juni mánað 2021 var skúlastjórin á Skúlatrød, inni og greiddi nevndini frá fíggjarviðurskiftum skúlans, har tað tíverri vísir seg at vera tendensir um meirnýtslu á fleiri økjum, antin av ov lítlari avseting ella av, at virksemið økist ella broytist.

Nevndirnar gjørdu tá hesar samtyktir:

TrN B&U 15. juni 2021: Nevndin tekur spurningin um fíggjartørv skúlans uppaftur til heystar.
FíN 22. juni 2021: Nevndin tekur undir við B&U 15-06-2021.
Viðfest er tilmælið ísv. omanfyri nevndu samtyktir, har skúlastjórin útgreinar og greiðir frá støðuni.

Vísandi til omanfyristandandi, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerð og støðutakan.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin:

> § 41. Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.
> Stk. 2. Kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.
> Stk. 3. Hevur kommunustýrið sambært lóg ella aðrari bindandi rættarreglu skyldu til at bera útreiðslurnar av ávísum tiltøkum, kann hetta setast í verk uttan játtan frammanundan, men játtan skal tá skjótast gjørligt fáast frá kommunustýrinum.

Fíggjarligar avleiðingar:

Barnaverndin	Ætlan 2021	Nýtsla pr. 31-08-2021	Nýtsla pct pr. 31-08-2021	Nýtsla umroknað 12 mðr	Mett meirnýtsla	Nýtsla pct pr. 31-12-2021
Undirvísing	11.445.000	8.023.920	70,1	12.035.880	-590.880	105,2
Skúlatrøð	3.921.000	2.284.160	58,3	3.426.240	494.760	87,4
Serskúlin Jústabrekka 1	40.000	77.998	195,0	116.997	-76.997	292,5
Skúlin í Árnafirði	20.000	9.129	45,6	13.694	6.307	68,5
Skúlin í Mikladali og Trøllanesi	71.000	18.926	26,7	28.389	42.611	40,0
Skúlin Svínoy	30.000	3.578	11,9	5.367	24.633	17,9
Skúlin á Húsum, Kalsoy	55.000	38.800	70,5	58.200	-3.200	105,8
Reingerð skúlabygningar	3.450.000	2.865.139	83,0	4.297.709	-847.709	124,6
Skúlabarnaflutningur & Vistarhald	250.000	118.500	47,4	177.750	72.250	71,1
Næmingagjald	-460.000	-283.264	61,6	-424.896	-35.104	92,4
Skúlabygningar	3.638.000	2.802.883	77,0	4.204.325	-566.325	115,6
Skúlatrøð samanlagt	11.015.000	7.935.849	72,0	11.903.774	-888.774	108,1
NR (Sernám) flutt	0	88.071		132.107	-132.107	
Endurgjald til lærlingaútreiðslur	430.000	0	0,0	0	430.000	0,0
	430.000	88.071	20,5	132.107	297.894	30,7
Samanlagt	11.445.000	8.023.920	70,1	12.035.880	-590.880	105,2

Av tí at umsitingin ikki sær møguleikar finna fígging við flyting millum rakstrarstøð, er neyðugt við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður biðið um eina eykajáttan í inniverandi ári (2021) til rakstrarstað nr. 04232270010 "Skúlatrøð" á 888.774 kr. sambært uppgerð roknskaparleiðarans.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 5. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 24-09-2021. Eykajáttanin skal fíggjast av *tøkum peningi*.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið frá B&U 05-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

166/21
21/01161-1 Hækkan og leingjan av kaiini á Eiðinum í Svínoy – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	05.10.2021	57/21
2 Fíggjarnevndin	26.10.2021	132/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	166/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	

21/01161-1 Hækkan og leingjan av kaiini á Eiðinum í Svínoy

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 27. sept. 2021, verður greitt nærri frá málinum.

Klaksvíkar kommuna og Landsverk hava samskift í fleiri ár um ætlanina hjá Landinum at leingja kaiina á Eiðinum í Svínoy, og fundir hava verið um málið, eftir at løgtingið játtaði kr. 4.975.000,- til verkætlanina í 2021. Málið er viðgjørt av HaVN og Svínoyarnevndini í 2020 og aftur í SvíN í 2021, har nevndin tók undir við ætlanini. Hóast talan er um eina kommunala kai, so var ein av niðurstøðunum hjá nevndunum, at hækkanin og leingjanin av kaiini er ein landsuppgáva.

Tann 28. mai 2021 kunnar stjórin á Landsverk kommununa um, at Landsverk hevur tikið feil av peningaligu viðurskiftunum í málinum, tí rætta upphæddin sum írestar er 1,7 mió.kr.

Umsitingin hevur mælt borgarstjóranum til kommunala luttøku, soleiðis at verkætlanin ikki bleiv skerd sum ætlað. Helst er samskiftið millum kommununa og Landsverk verið merkt av skundinum, sum málið hevur havt fyri at fáa verkætlanina framda í summar. Hetta er eisini orsøkin til, at málið ikki verður lagt fyri politisku skipanina fyrr enn nú.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin peningur er avsettur beinleiðis til verkætlanina í 2021. Tí skulu 1,7 mió. kr. finnast innan fyri verandi fíggjarkarm ella við møguligari eykajáttan.
Sum kunnugt, skal ein møgulig eykajáttan samtykkjast tvær ferðir av býráðnum, og avvarðandi landsstýrisfólk skal geva loyvi, um eykajáttanin verður fíggjað við lántøku.

Tilmæli:
Út frá samskiftinum, sum hevur verið millum kommununa og Landsverk, fer umsitingin við hesum at mæla til, at viðkomandi nevndir og býráð staðfesta málið, og taka støðu til, hvussu tann kommunali parturin verður fíggjaður.

Havna- og Vinnunevndin 5. oktober 2021:
Nevndin mælir til, at kommunali parturin av verkætlanini verður fíggjaður við eykajáttan og innanfyri karmin av seinastu lántøku.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið frá HaVN 05-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

167/21
20/01227-24 Vetrarhaldið í 2021 - serlig avbjóðing – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	15.09.2021	52/21
2 Fíggjarnevndin	21.09.2021	106/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	149/21
4 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	167/21

20/01227-24 Vetrarhaldið í 2021 - serlig avbjóðing

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. sept. 2021.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við at veita eina eykajáttan av *tøkum peningi* áljóðandi kr. 660 tkr.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TN 15-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá FíN 21-09-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá BýR 23-10-2021 einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

168/21
21/00407-30 Lántøka 2021 - oktober

169/21
17/00521-11 Umsókn um grundøki til vinnuligt virksemi

Fundurin lokin kl. 20:00